# Talvan er um at líkjast sær sjálvari

**Avrikini síðstu vikuna benda á, at stríðið um heiðurskrónurnar fer at standa millum feløgini í Havnini og í Runavíkini, og mikukvøldið øktist møguleikin fyri, at talið á Eysturoyar feløgum í bestu deildini næsta ár fer at verða uppaftur størri, enn tað longu er**



8. UMFAR SAMANUM
*Jóannes Hansen*

Í fínum fótbóltslíkindum varð næstsíðsta umfarið í fyrru helvt av kappingini fingið frá hondini mikukvøldið. Í sjey teimum fyrstu umførunum hevði HB ikki tapt, og Skála hevði ikki fingið stig. Mikukvøldið tapti HB, og Skála vann fyri fyrstu ferð. Nógvu tey fyrstu umførini vóru útisigrarnir nógvir. Mikukvøldið megnaði fyri aðru ferð á rað einki útilið at vinna.

At tað er so tætt millum týdningarmiklu uppgerðirnar, sum tað hevur verið og framvegis verður, hevur við sær, at tað er ikki meiri, enn at spælararnir fáa stundir at hvíla og fáa likamið og sinnið aftur í eina støðu, sum ber við sær, at teir tríggjar ella fýra dagar seinni eru púra úthvíldir og aftur klárir at fara undir nýggja avbjóðing.

Í feløgunum er ikki talan um rættuligar venjingar í hesum døgum. Teir renna eitt sindur fyri at loysa vøddarnar, fysioterapeutarnir hava úr at gera, og spælarar og venjarar taka saman við teimum serkønu á økinum støðu til, um tað er ráðiligt, at hesin ella hin spælarin skal vera við næstu ferð, og um hann hóast snudd skal vera millum teir fyrstu ellivu, ella um hann skal sita á beinkinum.

Hjá teimum, sum eru á aldukambinum, bilar tað lítið, at tað er nógv á skránni. Tað ræður um at fáa so nógvan og góðan ágóða av gongdini, sum tað ber til. Eitt nú hjá B36 og NSÍ spælarunum hevur tað verið stuttligt at verið til venjingar í gjárkvøldið, og teir fara aftur í kvøld hugaligir at venja. Heilt so hugaligt er tað neyvan hjá t. d. KÍ spælarunum og eisini hjá vágamonnunum og vágbingunum. At megna at gera broytingar, sum longu sunnudagin skulu vísa seg í betri avrikum og úrslitum, er lítið sannlíkt.

## Trio í toppinum

Í fjør endaðu báðir grannadystirnir í Gundadali 2–1. HB vann útidystin ímóti B36, og B36 vann útidystin ímóti HB. Eftir 2–1 sigurin hjá B36 í heimadystinum hjá HB mikukvøldið letur tað til, at tølini skulu ganga aftur í ár.

At HB einki fekk burturúr hesa ferð hevur við sær, at teir ikki hava fingið fult í tveimum teimum seinastu royndunum, og tað hevur aftur við sær, at teir fyri fyrstu ferð í hesum kappingarárinum ikki eru oddalið.

B36 skinklaði í fyrstu umførunum. Tað var akkurát so, at teir vunnu á Skála, har tað var lagt upp til málleysan javnleik. Nú kann lítast ein mánað aftur í tíðina og snarast og vendast, hvat teir mundu havt tikið sær fyri, um B36 ikki hevði vunnið ta ferðina. Møguleikin at siga venjaranum upp varð nevndur av fleiri. Ein mánað seinni kann Ion Geolgau gleðast um, at hann, í staðin fyri at vera arbeiðsleysur, er venjari hjá oddaliðnum. Marginalirnir eru smáir. Ikki minst hjá venjarunum, sum hava so stórt trýst á sær.

B36 og NSÍ eru lið um lið í stigum og eisini í málmuni. NSÍ hevur skorað fleiri mál enn B36, men kortini er B36 oddalið. Tað kemst av ásetingini um, at innanhýsis uppgerðirnar viga meiri enn málmunurin og skorað mál. At NSÍ hevur spælt ein dyst fleiri enn B36 er ein heilt onnur søga. Mikukvøldið í komandi viku fær B36 vitjan av VB. Tá fer NSÍ, sum longu mikukvøldið í síðstu viku gjørdi ferðina yvir á Skála av sær, at halda frí.

At tað eru B36, NSÍ og HB, sum eru oddalið, man ikki vera so langt av leið frá tí, sum tað undan kappingarárinum varð roknað við. Hesi liðini hava verið støðug, og tey tykjast at vera manningarliga væl fyri og betri skipað í øllum ketunum, enn hini liðini eru tað.

Hjá B68 hevur tað kostað nógv, at teir í fimm av átta royndum ikki hava megnað meiri enn javnleik. Úrslitini hjá KÍ seinastu tíðina hava víst, at teir hava ikki tað, sum skal til fyri at vera við í toppinum. Eftir gongdini seinastu ferðirnar er tað púra óhugsandi, at teir kunnu gera nakað við HB, sum vitjar í Klaksvík sunnudagin. Men um tað skuldi eydnast hjá KÍ at funnið stríðsvilja og alt annað fram, og at teir spælararnir, sum hvat heilsuliga førleikanum viðvíkur eru førir fyri tí, sleppa at royna seg, og tað hevði borið sigur við sær, so verður KÍ aftur við í toppinum. Men hetta tykist rættuliga óhugsandi.

GÍ hevur bara fingið eitt stig burturúr tveimum teimum síðstu landskappingardystunum. Gøtumenn kunnu ugga seg við, at luturin hjá teimum í altjóða avbjóðingum er av á hesum sinni. Tað er hann ikki hjá HB, sum seinni í hesum mánaðinum skal royna seg í fyrsta innleiðandi umfarinum í europeisku meistarakappingini, og tað er hann ikki hjá NSÍ og KÍ, sum í august skulu spæla í innleiðandi umfarinum í UEFA Cup.

## Eysturoyggin uppaftur størri umboðan

Nógvu tey seinastu árini hevur Eysturoyggin átt umleið eina helvt av feløgunum í bestu deildini. Í ár eru tað GÍ, NSÍ, B68, Skála og EB/Streymur. Úrslitini mikukvøldið gjørdu møguleikan meiri nærliggjandi, enn hann hevur verið, at tað næsta ár fara at verða seks Eysturoyar lið í 1. deild. Soleiðis verður tað, um ÍF flytir upp, og um Skála og EB/Streymur ikki flyta niður. NSÍ, B68 og GÍ flyta neyvan niður.

ÍF er topplið í 2. deild, og tað skal ganga fuglfirðingum heilt illa seinni í summar, um teir ikki fara at flyta upp. Tað hilnast ikki altíð so væl hjá heimaliðunum í stevnudystunum. Leygardagin er Varmakeldustevnan á skránni. Tá skal ÍF í grannauppgerð ímóti LÍF. Níggjunda og síðsta umfarið undan summarsteðginum í 2. deild er á skránni hetta vikuskiftið.

Skála er framvegis besta boðið upp á niðurflyting, men sigurin á FS Vágum eigur at geva teimum blóð á tonna. Við javnleikinum í Vági styrkti EB/Streymur uppaftur meiri um sína støðu. Kappingarneytarnir hjá Skála eru VB og FS Vágar. Sunnudagin skal Skála spæla á Eiði, og VB skal á Toftir, har teir ikki so sjáldan hava staðið seg væl. Eftir summarsteðgin eigur Skála heimavøll ímóti VB og EB/Streymi og útivøll ímóti FS Vágum.

Nú tað nærkast summarsteðginum, eru tað ivaleyst fleiri, sum kaga í søguligu tølini fyri at síggja, hvussu nógv stig plaga at skula til fyri at sleppa undan aftasta plássinum. Seinastu fimm árini hevur 9. plássið verið mannað soleiðis: 1998: Sumba 9 stig, 1999: Sumba 11 stig, 2000: FS Vágar 11 stig, 2001: B71 10 stig og 2002: EB/Streymur 12 stig. Í 2001 tapti B71 endaspælið um plássið í bestu deildini. Hini árini hevur 1. deildarliðið vunnið endaspælið ímóti tí næstbesta liðnum í 2. deild.



# Sonni skoraði fýra ferðir

**NSÍ spældi illa skipað og í orðsins sanna týdningi haltandi KÍ lið fullkomuliga út av vøllinum**



NSÍ–KÍ
*Jóannes Hansen*

Klaksvíkingar eru trúfastir ímóti KÍ. Tað sást mikukvøldið, tá ið teir ikki vóru heilt fáir, sum fylgdu við til Runavíkar. Stóri spurningurin var, um tað skuldi ganga, sum tað gjørdi, síðst tá ið KÍ var á útivølli, ella um vónin um endurreisn skuldi gerast til veruleika.

Spurningurin var svaraður, tá ið eitt korter var farið. Tá hevði NSÍ eftir lítlari løtu lagt seg á odda við tveimum málum. Hóast gestirnir løtuna aftaná tóktust hava hampuliga fatur á spælinum, so vóru teir púra tannleysir, og tað var bara ein spurningur um tíð, nær NSÍ fór at sekta okkurt av heilt nógvu persónligu mistøkunum.

NSÍ skoraði tvær ferðir afturat. Teir høvdu møguleikar, sum kundu havt endurtøku av KÍ úrslitinum ímóti B36 við sær. At tað ikki fór so vítt, vóru tað tvær orsøkir til. Onnur var KÍ málverjin Kartin Joensen. Hann var greitt besti maðurin á KÍ liðnum. Hin orsøkin var hugburðurin hjá NSÍ til uppgávuna í 2. hálvleiki. Tá løgdu teir seg longri aftur á vøllin, og so skiftu teir onkrar av lyklaspælarunum út. Longu sunnudagin skulu teir aftur í eldin, og tað var eingin orsøk at ovurerva seg mikukvøldið.

Um NSÍ hevði hildið fram at trýst mótstøðuliðið frammi á vøllinum, so høvdu teir heilt víst fingið fleiri mál.

Hjá KÍ var tað ikki so galið fyrsta lítla korterið, og teir kunnu filosofera yvir, hvussu tað hevði lagað seg, um Hjalgrím Elttør hevði skorað, tá ið hann var einsamallur við Jens Martini Knudsen, sum annars hevði millum lítið og einki at gera. Men tá ið NSÍ legði seg framum, høvdu longu tvær støður verið, har Kartin Joensen hevði bjargað liðfeløgunum, sum høvdu gjørt stór persónlig mistøk.

Tá ið NSÍ hevði skorað tvær ferðir, kendist mótbrekkan tung hjá KÍ, meðan NSÍ hevði undanbrekku. Heimamenninir vóru fyrri á bóltinum, teir fluttu seg betri, teir vóru nógv betri skipaðir í verjupartinum, har Óli Hansen við innbundnari brotnari hond ongar trupulleikar hevði saman við Messias Perreira at halda mótstøðumonnunum burtur, og so høvdu teir Sonna L. Petersen á toppinum. Hann er skjótur og raskur, og tað vóru mikukvøldið serliga góðar dygdir. Sonni skoraði fýra mál, og hvørja ferð var hann blankur og stutt úr málinum.

At KÍ var illa skipað og enn eina ferð vísti, at teir als ikki havav tak á, hvussu flata verjan skal stýrast, fer ivaleyst framvegis at kosta nógv mál. Men tað tóktist heilt við síðuna av og merkisvert, at teir í Runavík høvdu tríggjar spælarar á liðnum, sum vóru so mikið illa fyri, at teir so langt í frá vóru førir fyri at vísa tað, sum teir áður hava gjørt. Tað ber ikki til ímóti nøkrum liði í bestu deildini, og so als ikki ímóti einum mótstøðuliði, sum er so ágangandi, sum NSÍ var tað mikukvøldið.

Tá ið NSÍ væl og virðiliga hevði vunnið, og teir tóku sær av løttum, broytti KÍ uppstilling, og tá sást tað, at tað ber til hjá klaksvíkingum at samanskrúva liðið soleiðis, at fyrsta fyritreytin av øllum, at allir á miðvøllinum hava heilsu til og orka at renna, verður uppfylt.

## Málini

Í 14. minutti gav KÍ verjan fyrsta málið burtur. Altíð ágrýtni Jónstein Petersen kom ímillum kiksaða afturlegging. Kartin Joensen fekk bent skotroyndini á tvørtræið, og Sonni L. Petersen var frammanfyri allar hinar, tá ið hann við høvdinum stýrdi bóltinum í tóma málið.

Í næsta minuttinum var aftur mál, og aftur var útsøla av alt skal út slagnum í KÍ verjuni. Brynjolvur Nielsen sendi fríspark innfyri úr høgru, og fýra metrar úr málinum og mitt fyri! var Sonni L. Petersen blankur, tá ið hann setti krúllin undir bóltin.

Í 28. minutti var aftur galið í KÍ verjuni, og NSÍ takkaði aftur fyri. B36 uppskriftin – diagonalsending afturum vongverjan – varð brúkt. Christian Høgni Jacobsen gjørdist púra leysur, men Kartin Joensen vann tvídystin. Horna spurdist burturúr, og eftir tvær ferðir aftur og fram lyfti Sjúrður Jacobsen úr høgru upp um eitt sindur uttarlaga stadda málverjan. Verjuspælari royndi at renna bóltin upp, men Sonni L. Petersen vann kapprenningina og so var 3–0.

Síðsti seymurin varð negldur í, tá ið fyrra umfarið var um at vera runnið. Aftur var Christian Høgni Jacobsen leysur í høgru, flata innleggið fór til handara stólpan, har Jónstein Petersen var púra blankur, skotroyndin hjá honum kiksaði, men so var blanki Sonni L. Petersen á rætta staðnum og stýrdi úr trimum metrum í málið. Tá tosaðu trúføstu KÍ viðhaldsfólkini um at fara ein túr fyrri til hús ella kanska at fara til Gøtu at síggja 2. hálvleik. Men tey flestu mundu vera standandi, og í 2. hálvleiki gjørdist støðan ikki verri. Tað komst fyrst og fremst av, at NSÍ tók sær av løttum.



### NSÍ–KÍ 4–0 (4–0)

1–0: Sonni L. Petersen 14.
2–0: Sonni L. Petersen 15.
3–0: Sonni L. Petersen 28.
4–0: Sonni L. Petersen 45.
**Dómari:** Páll Augustinussen
**NSÍ:** Jens Martin Knudsen – Brynjolvur Nielsen, Óli Hansen, Messias Perreira, Sjúrður Jacobsen – Gert Langgaard (Jústinus R. Hansen, 67.), Rúni Rasmussen, Ian Højgaard, Jónstein Petersen (Andy Olsen, 59.) – Christian Høgni Jacobsen, Sonni L. Petersen (Áki L. Hansen, 76.)
**KÍ:** Kartin Joensen – Harley Bertholdsen (Leon Bjartalíð, 57.), Sámal Eyðfinn Akursmørk (Eyðun Klakstein, 57.), Jan Andreasen, Símun Joensen – Atli Danielsen, Jan Joensen, Allan Joensen, John Ryan – Ove Nysted (Aleksander Djordjevic, 46.), Hjalgrím Elttør